Medical Report 2026
From the Chief Medical Officer
in the Faroe Islands

HEILSULÝSING LANDSLÆKNANS 2026



Tittul: Heilsulýsing Landslæknans 2026
Medical Report 2026 from the Chief Medical Office in the Faroe Islands

Útgevari: Landslæknin, Tórshavn 2026
1. útgáva

Chief Medical Office
Landslæknin

Tinghúsvegur 42
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
TLF: +298 660400
Teldupostur: foe@stps.dk
Heimasíða: www.landslaeknin.fo

Starvsfólk

Lars Fodgaard Møller, landslækni
Jóhanna Ljósá Hansen, cand.scient.med.
Lona P. Johansen, skrivstovufulltrúi
Liljan Midjord, skrivari
Sara Elisa Joensen, skrivari

Konsulentar

Olga Kristina Hansen, lækni
Eyðbjørg Klemmentsen Gaard, lækni
Barbara Joensen Eysturoy, lækni

Heilsulýsing Landslæknans 2026

Tórshavn
November
2026

Innihaldsyvirlit

1. Landslæknaembætið 8

1.1 Nevndir o.a. . . . 8

1.2 Ráðgeving og undirvísing . . . 8

2. Fólkatalið, fødd á lívi og deyð 9

2.1 Deyð hvønn mánað í 2025 - ávikavist menn og kvinnur . . . 9

3. Føðingarhagtøl 10

3.1 Burðaravlop . . . 10

3.2 Fødd á lívi . . . 10

3.3 Tal á føddum børnum eftir móðuraldri o.ø. . . . 12

3.4 Tal á føðingum hjá mammum undir 20 ár . . . 12

3.5 Føðingar, eftir hvussu gamal pápin var, tá ið barnið varð føtt . . . 12

3.6 Deyðfødd børn og tíðleiki av deyðføddum . . . 13

3.7 Føðingar áður – deyðføðingar, spontanir abortar og fosturtøkur . . . 13

3.8 Burðarvekt, skift á øki . . . 14

3.9 Vekt og longd hjá børnum, fødd á lívi . . . 15

3.10 Talið á roykjarum í % við fyrstu barnakonukanning . . . 15

3.11 Burðarvekt í mun til um mamman roykir ella ikki roykir . . . 15

3.12 Tvíburar . . . 16

3.13 Apgarscore . . . 16

3.14 Fødd innan- og uttan hjúnalags . . . 17

3.15 Sambúgvandi við fyrstu barnakonukanning . . . 18

3.16 Føðingar á sjúkrahúsum . . . 19

3.17 Føðingar við keisaraskurði . . . 19

3.18 Keisaraskurðir á Landssjúkrahúsinum og Suðuroyar Sjúkrahúsi 20
3.19 Viðgongutíð 20
3.20 Stakfødd fødd á lívi, eftir viðgongutíð og burðarvekt 21
3.21 Øll børn, fødd á lívi, eftir burðarvekt 21
3.22 Børn, skift á øki (roknað uppí eru børn, sum eru fødd í Føroyum, men mamman búði uttanlands) 22
3.23 Vøggudeyði (SIDS) 22

4. Fosturtøkur (abortus provocatus) 23

4.1 Tal á fosturtøkum í Føroyum, eftir aldri á kvinnunum 23

5. Stervingar (sterilisatiónir) 24

5.1 Fundir í Stervingarnevndini (Sterilisatiónsnevndini) 24
5.2 Tølini fyri játtaðar umsóknir 24

6. Deyðleiki 25

6.1 Tal á føroyingum, deyðir í 2025 25
6.2 Pinkubarnadeyði 25
6.3 Deyðfødd 25
6.4 Miðal væntað lívsævi frá lívsbyrjan og frá 65 ára aldri 25
6.5 Væntaður livialdur hjá nýføðingum í Føroyum 26
6.6 Deyðastað 27
6.7 Deyðaatvold hjá føroyingum 27

7. Rættarlæknaligt virksemi 30

7.1 Rættarlæknaligar líkskoðanir 30
7.2 Rættarlæknaligir líkskurðir 30
7.3 Líkpass 30
7.4 Náttúrligur deyði 30
7.5 Vanlukkutilburðir 30

7.6 Sjálvmorð 31

8. Virksemi viðvíkjandi umhvørvi 32

8.1 Kirkjugarðar 32

8.2 Mál um at umhvørvisgóðkenna virki 32

9. Eftirlit við heilsuverkinum 33

9.1 Heilsufaklig eftirlit 33
9.1.1 Skráseting 33
9.1.2 Gjald 34
9.1.3 Eftirlitsfrágreiðingar 34

9.2 Eftirlit við einstaklingum 34

9.3 Eftirlit við viðgerðarfyriskipanum 34

9.4 Mál viðvíkjandi løggildum heilsustarvsfólki við 75 ára aldur 34

9.5 Kærur um løggild heilsustarvsfólk 35

9.6 Stúranarskriv 35

10. Apoteksverkið 36

10.1 Apotek, handkeypssølur og starvsfólk í 2025 36

10.2 Skrásetingarnevndin 36

10.3 Útflýggingarloyvi 36

11. Annað virksemi 37

11.1 Mál viðvíkjandi koyrikorti 37

11.2 Metingar av heilsustøðu 37

11.3 Gitnaðarmál 37

11.4 Verjumál 37

11.5 Upplýsingar úr sjúkrajournalum til gransking, hagtøl ella ráðlegging 37

11.6 Gransking 37

11.7 Skjalainnlit 37

12. Fólkaheilsa **38**

12.1 Koppseting 38
12.1.1 Áminningarskipan 38

12.2 Cerebral paresa 38

12.3 Rúsdrekkasøla 39

1. Landslæknaembætið

Landslæknaembætið er stovnur undir Sundheds- og Kirkeministeriet í Danmark og er fakliga knýttur at Styrelsen for Patientsikkerhed.

Umframt landslæknan eru at stovninum knýtt trý skrivstovufólk og ein cand.scient med.

Landslæknin hevur hesar uppgávur:

- at ráðgeva Føroya Landsstýri og kommunalum myndugleikum í læknaligum, heilsufrøðiligum, umhvørvisligum og sosialmedisinskum viðurskiftum.
- at hava eftirlit við viðgerðarstøðum og við tí heilsufakliga virksemi, ið løggild heilsustarvsfólk (læknar, tannlæknar, sjúkrarøktarfrøðingar, fysioterapeutar o.o.) útinna í Føroyum.
- at veita stuðul til rættarmynduleikar og løgreglu í rættarlæknaligum- og líknandi málum.
- at gera tilmæli til Akstovuna í koyrikortmálum.
- at meta heilsuváttanir í sambandi við tænastumannastørv.
- at gera tilmæli til Landsstýrið viðv. lógum, kunngerðum, leiðbeiningum o.ø. við atliti til heilsufakliga/-løgfrøðiliga leiðbeining.
- at viðgera mál um nýtslu av heilivági, ið ikki er skrásettur.
- at gera hagtalsarbeiði í sambandi við deyðaváttanir og føðifráboðanir.
- at lýsa kærumál fyri Styrelsen for Patientklager.
- at hava eftirlit við nýtsluni av turvelvandi og øðrum útvaldum bólkum av heilivági.

1.1 Nevndir o.a.

Landslæknin er m.a. limur í Farsóttarnevndini, Heilivágsráðnum, Føroyska Pandemibólkinum og Tilbúgvingarráði Føroya.

1.2 Ráðgeving og undirvísing

Umframt tær føstu uppgávurnar veitir Landslæknin heilsustarvsfólkum og myndugleikum ráðgeving í sambandi við ymiskar spurningar. Í 2025 veitti Landslæknin ráðgeving í 50 málum.

Harumframt undirvísir Landslæknin av og á. Landslæknin undirvísir m.a. yngri læknum í at skriva deyðsváttanir tvær ferðir um árið.

2. Fólkatalið, fødd á lívi og deyð

Sambært Hagstovu Føroya var fólkatalið hin 1. januar 2025 **54.497**. 1. januar 2026 var fólkatalið **54.886**.

Fólkatalið, skift á kyn og aldur pr. 1. januar 2026												
Aldur	**00-09**	**10-19**	**20-29**	**30-39**	**40-49**	**50-59**	**60-69**	**70-79**	**80-89**	**90-99**	**100+**	**Tilsamans**
Menn	3728	3781	3285	3819	3545	3620	3118	2372	1135	166	3	28572
Kvinnur	3475	3630	2602	3449	3089	3179	3020	2335	1210	313	12	26314
M+K	**7203**	**7411**	**5887**	**7268**	**6634**	**6799**	**6138**	**4707**	**2345**	**479**	**15**	**54886**

Kelda: Hagstova Føroya, 05. okt. 2026.

Sambært fráboðanum frá ljósmøðrum og prestum vóru tølini á livandi føddum og deyðum í 2025 hesi:

	Tal
Fødd á lívi	635
Deyð	419

Keldur: Føðifráboðanir og deyðsattestir frá ljósmøðrunum á teimum føroysku sjúkrahúsunum, Landslæknin og sóknarprestarnir

2.1 Deyð hvønn mánað í 2025 - ávikavist menn og kvinnur

	Menn	Kvinnur	Tilsamans
Januar	17	16	33
Februar	21	13	34
Mars	23	18	41
Apríl	14	14	28
Mai	19	17	36
Juni	18	18	36
Juli	18	24	42
August	14	18	32
September	19	17	36
Oktober	22	15	37
November	18	15	33
Desember	16	15	31
Alt árið	**219**	**200**	**419**

3. Føðingarhagtøl

Keldur: Landslæknin ger føðingarhagtølini út frá føðifráboðanum frá ljósmøðrunum á teimum føroysku sjúkrahúsunum og fráboðanum frá sóknarprestunum.

Føðingarfráboðaninar vísa, at ljósmøður í 2025 vóru um 633 føðandi kvinnur, ið føddu 640 børn, og av hesum vóru 635 fødd á lívi. Av teimum vóru sjey tvíburar.

3.1 Burðaravlop

Burðaravlopið (fødd á lívi minus deyð) var 216 í 2025.

Gongdin seinastu árini hevur verið henda:

Ár	Tal
2025	216
2024	142
2023	167
2022	150
2021	257
2020	274
2019	274
2018	288
2017	207
2016	306

3.2 Fødd á lívi

Sambært føðingarfráboðanum og fráboðanum frá prestum vóru fødd 635 livandi børn í 2025, 355 dreingir og 280 gentur. Átta av hesum børnum vórðu fødd á Ríkissjúkrahúsinum, eitt á Aarhus Universitetshospital og eitt á Herlev Hospital. Fimm av kvinnunum, ið áttu, búðu uttan fyri Føroyar.

Talið á børnum, fødd á lívi, hevur seinastu árini verið hetta:

Ár	Tal á børnum, fødd á lívi
2025	635
2024	586
2023	573
2022	629
2021	682
2020	678
2019	678
2018	681
2017	652
2016	686

Miðaltalið á børnum, fødd á lívi, nøkur 5-ára tíðarskeið:

Ár	Børn fødd á lívi í miðal
2025 – 2021	621
2020 – 2016	675
2015 – 2011	620
2010 – 2006	661
2005 – 2001	700
2000 – 1996	657

3.3 Tal á føddum børnum eftir móðuraldri o.ø.

Í talvuni niðanfyri sæst, at miðalaldurin á føroyskum kvinnum, ið áttu fyrstu ferð, var 28,4 ár í 2025. Til samberingar kann nevnast, at í Danmark var miðalaldurin á kvinnum, ið áttu fyrstu ferð í 2025 30,4 ár.

	Tal á føðingum	% av øllum føðingum	Miðalaldur á mammum
Átt 1. ferð	221	34,9	28,4
Átt 2. ferð	206	32,5	31,5
Átt 3. ferð	140	22,1	33,4
Átt 4. ferð	44	7,0	35,3
Átt 5.+ ferð	12	1,9	36,6
Ikki upplýst	10	1,6	30,7
Tilsamans	**633**	**100**	**31,2**

3.4 Tal á føðingum hjá mammum undir 20 ár

Í 2025 áttu mammur, sum vóru millum 16 og 19 ár, átta av børnunum.

3.5 Føðingar, eftir hvussu gamal pápin var, tá ið barnið varð føtt

Aldur	< 24	25-29	30-34	35-39	40-44	≥ 45	Ikki upplýst	Tils.
Tal	42	122	202	150	79	25	13	633

Miðalaldurin á pápum hjá nýføðingum var 34,0 í 2025. Til samanberingar kann nevnast, at í Danmark var miðalaldurin 33,8 í 2025.

3.6 Deyðfødd børn og tíðleiki av deyðføddum

Fimm børn vóru deyðfødd í 2025. Við tølunum: 635 fødd á lívi og fimm deyðføddum er tíðleikin av deyðføddum í 2025 7,8‰.

Tíðleikin av deyðføddum í Føroyum hevur seinastu árini verið:

Ár	‰
2025	7,8
2024	1,7
2023	1,7
2022	7,9
2021	1,5
2020	2,9
2019	4,4
2018	1,5
2017	1,5
2016	2,9

3.7 Føðingar áður – deyðføðingar, spontanir abortar og fosturtøkur

Tær 633 kvinnurnar, ið áttu í 2025 høvdu samanlagt áður átt fimm deyðfødd børn, áður havt 216 spontanar abortar og 40 fosturtøkur.

	Føðandi kvinnur	Deyðføðingar áður	Spontanir abortar áður	Fosturtøkur áður
2025	633	5	216	40
2024	581	6	245	33
2023	569	1	235	44
2022	621	8	227	28
2021	677	3	246	30

3.8 Burðarvekt, skift á øki

Í 2025 vigaðu nýføðingar úr Sandoy mest í miðal (3759 g), og nýføðingar úr Streymoynni uttanfyri Tórshavn vigaðu minst í miðal (3535 g).

Miðal føðivekt fyri øll børn, skift á øki, sæst í talvuni niðanfyri:

	Vekt (g)	Tal á børnum
Thn. Hoyv. Arg.	3711	243
Streymoy - Thn.	3535	51
Eysturoy	3688	167
Vágoy	3597	37
Norðoyggjar	3695	87
Sandoy	3759	11
Suðuroy	3569	33
Bústaður uttanfyri Føroyar	3629	5
Ikki upplýst	*	6
Alt landið	3675	640

* Vektin er ikki upplýst fyri hesi børn

Miðal føðivekt fyri stakfødd børn, skift á øki, sæst í talvuni niðanfyri:

	Vekt (g)	Tal á børnum
Thn. Hoyv. Arg.	3717	241
Streymoy - Thn.	3567	49
Eysturoy	3700	165
Vágoy	3658	35
Norðoyggjar	3713	85
Sandoy	3759	11
Suðuroy	3652	29
Bústaður uttanfyri Føroyar	3629	5
Ikki upplýst	*	6
Alt landið	3694	626

* Vektin er ikki upplýst fyri hesi børn

3.9 Vekt og longd hjá børnum, fødd á lívi

Hægsta burðarvekt í 2025 var 5340 g (ein genta). Lægsta burðarvekt í 2025 var 875 g (ein genta).

Tølini hava síðani 2016 verið hesi:



Longsti nýføðingur í 2025 var 60 cm langur (ein genta). Stytsti nýføðingurin í 2025 var 34 cm langur (ein drongur).

Tølini hava síðani 2016 verið hesi:



3.10 Talið á roykjarum í % við fyrstu barnakonukanning

Sambært fráboðanum frá ljósmøðrum royktu 41 av 633 barnakonum í 2025, tá ið tær vóru til fyrstu barnakonukanning (6,5%). 13 (2,1%) av mammunum í 2025 hava ikki upplýst, hvørt tær royktu ella ikki.

3.11 Burðarvekt í mun til um mamman roykir ella ikki roykir

Miðalburðarvektin í 2025 hjá livandiføddum børnum har mamman roykti, tá hon var til fyrstu barnakonukanning, var 3687 g. Hjá teimum, ið ikki royktu, var miðalburðarvektin 3688 g.

3.12 Tvíburar

Í 2025 vóru sjey tvíburar føddir, allir á Landssjúkrahúsinum. Allir vóru føddir á lívi. Miðalaldurin á mammunum í 2025 var 31,6. Av hesum sjey tvíburunum vóru seks pør fødd til tíðina og eitt í viku 36.

Eitt barn vigaði undir 2000 g, níggju av børnunum vigaðu millum 2000 og 2999 g og fýra 3000 g og yvir. Í miðal vigaðu børnini 2825 g.

3.13 Apgarscore

Apgarscore er eitt samanlagt tal, tá ið mett verður um støðuna hjá barninum, beint eftir at tað er føtt. Mett verður um fimm ymisk viðurskifti, og millum 0 og 2 stig verða givin. Tey fimm økini, ið mett verða, eru: andadráttur, húðarlitur, hjartasláttur, viðbrøgd (refleksir) og vøddaspenningar, sum tilsamans kunnu geva upp í 10 stig. Apgarscore verður mett eftir 1. og 5. minutti.

Apgarscore í miðal í 2025 í 1. og 5. minutti, skift á viðgongutíð, føðingarhátt og eftir um mamman roykir ella ikki roykir:



3.14 Fødd innan- og uttan hjúnalags

265 børn (41,4%) vóru fødd innan hjúnalags meðan 371 (58,0%) vóru fødd uttan hjúnalags í 2025.



Hesi tøl í % hava seinastu árini verið:

Ár	Innan hjúnalags	Uttan hjúnalags	Ikki upplýst
2025	41,4	58,0	0,6
2024	45,3	53,8	0,9
2023	46,0	52,8	1,2
2022	44,6	54,4	0,9
2021	41,3	58,5	0,2
2020	43,9	55,7	0,4
2019	39,1	60,2	0,7
2018	44,1	55,5	0,4
2017	44,9	54,6	0,5
2016	46,2	53,7	0,1

3.15 Sambúgvandi við fyrstu barnakonukanning

Í 2025 hava 590 mammur (93,2%), sum áttu, sagt, at tær búgva saman við pápanum. 34 (5,4%) mammur búðu ikki saman við pápanum.



Hesi tøl í % hava seinastu árini verið:

	2025		2024		2023		2022		2021	
	Tal	%	Tal	%	Tal	%	Tal	%	Tal	%
Mamman býr saman við pápanum	590	93,2	545	93,8	528	92,8	585	94,2	632	93,4
Mamman býr ikki saman við pápanum	34	5,4	29	5,0	30	5,3	29	4,7	42	6,2
Ikki upplýst	9	1,4	7	1,2	11	1,9	7	1,1	3	0,4
Tilsamans	**633**	**100**	**581**	**100**	**569**	**100**	**621**	**100**	**677**	**100**

3.16 Føðingar á sjúkrahúsum

636 t.e. 99,4% av øllum føðingum fóru fram á sjúkrahúsum í 2025. Fýra kvinnur áttu heima.

Hesi tøl í % hava seinastu árini verið:

Ár	%
2025	99,4
2024	98,8
2023	99,1
2022	99,1
2021	99,3
2020	98,7
2019	99,6
2018	99,6
2017	98,8
2016	99,6

3.17 Føðingar við keisaraskurði

Sambært føðifráboðanum frá ljósmøðrunum vóru 119 børn fødd við keisaraskurði í 2025 og 511 gjøgnum móðurskeiðina (vaginalt).

	2025		2024		2023		2022		2021	
	Tal	%	Tal	%	Tal	%	Tal	%	Tal	%
Børn, fødd við keisaraskurði	119	18,6	90	15,3	101	17,9	104	16,4	121	17,9
Børn, fødd gjøgnum móður-skeiðina (vaginalt)	511	79,8	490	83,5	463	80,5	522	82,3	553	81,7
Ikki upplýst	10	1,6	7	1,2	10	1,6	8	1,3	3	0,4
Tilsamans	**640**	**100**	**587**	**100**	**574**	**100**	**634**	**100**	**677**	**100**

3.18 Keisaraskurðir á Landssjúkrahúsinum og Suðuroyar Sjúkrahúsi

	Landssjúkrahúsið			Suðuroyar Sjúkrahús			Tilsamans		
	Føðingar	Keisara-skurðir	%	Føðingar	Keisara-skurðir	%	Føðingar	Keisara-skurðir	%
2025	625	119	19,0	1	0	0,0	626	119	19,0
2024	573	89	15,5	0	0	0,0	573	89	15,5
2023	558	101	18,1	0	0	0,0	558	101	18,1
2022	619	104	16,8	1	0	0,0	620	104	16,8
2021	667	121	18,1	3	0	0,0	670	121	18,1
2020	656	101	15,4	1	0	0,0	656	101	15,4
2019	668	116	17,4	3	1	33,3	671	117	17,4
2018	668	87	13,0	1	0	0,0	669	87	13,0
2017	630	113	17,9	1	1	100	631	114	18,1
2016	669	116	17,3	5	1	20,0	674	117	17,4

Kvinnur, búsitandi í Suðuroy, áttu í 2025 33 børn (sí stk. 3.22). Sum talvan vísir, var ein føðing á Suðuroyar Sjúkrahúsi í 2025. Síðani 2016 eru allar føðingar miðsavnaðar á Landssjúkrahúsinum.

3.19 Viðgongutíð

558 av teimum 635 børnunum (87,9%), ið vóru fødd á lívi í 2025, vórðu fødd rættstundis, t.e. í viku 37 – 41.

4,3% av børnunum í 2025 vórðu fødd ov tíðliga, t.e. fyri 37. viku, og 6,1% av børnunum vórðu fødd í 42. viku ella seinni.

Í talvuni niðanfyri síggjast tølini fyri viðgongutíð fyri børn fødd á lívi frá 2016 – 2025.

Vikur	<32		32-36		37-41		42		Ikki upplýst		Tilsamans	
Ár	**Tal**	**%**	**Tal**	**%**	**Tal**	**%**	**Tal**	**%**	**Tal**	**%**	**Tal**	**%**
2025	2	0,3	25	3,9	558	87,9	39	6,1	11	1,7	635	100
2024	2	0,3	11	1,9	526	89,8	37	6,3	10	1,7	586	100
2023	6	1,0	20	3,5	502	87,6	35	6,1	10	1,7	573	100
2022	1	0,2	28	4,5	550	87,4	43	6,8	7	1,1	629	100
2021	3	0,4	24	3,5	596	87,4	49	7,2	10	1,5	682	100
2020	4	0,6	21	3,1	577	85,1	71	10,5	5	0,7	678	100
2019	2	0,3	22	3,3	567	83,6	83	12,2	4	0,6	678	100
2018	0	0,0	19	2,8	612	90,3	44	6,5	3	0,4	678	100
2017	3	0,5	29	4,4	571	87,6	47	7,2	2	0,3	652	100
2016	2	0,3	31	4,5	607	88,5	34	5,0	12	1,7	686	100

3.20 Stakfødd fødd á lívi, eftir viðgongutíð og burðarvekt

25 av stakføddu, livandi børnunum vóru fødd ov tíðliga, t.e. fyri 37. viku í 2025. Tvíbura-føðingar eru ikki íroknaðar. Lagt kann verða afturat, at miðal burðarvektin fyri føroysk børn, ið vóru fødd í ella eftir 42. viku í 2025, var 4127 g.

3.21 Øll børn, fødd á lívi, eftir burðarvekt

Ár	2025		2024		2023		2022		2021	
Vekt	**Tal**	**%**	**Tal**	**%**	**Tal**	**%**	**Tal**	**%**	**Tal**	**%**
Niðanfyri 2500 g										
< 1 kg	1	0,2	2	0,3	1	0,2	0	0,0	0	0,0
1000-1499	2	0,3	1	0,2	4	0,7	0	0,0	2	0,3
1500-1999	2	0,3	1	0,2	2	0,3	6	1,0	3	0,4
2000-2499	11	1,7	4	0,7	11	1,9	15	2,4	12	1,8
Tils. niðanfyri 2500 g	**16**	**2,5**	**8**	**1,4**	**18**	**3,1**	**21**	**3,3**	**17**	**2,5**
2500+										
2500-2999	57	9,0	41	7,0	44	7,7	50	7,9	42	6,1
3000-3499	131	20,6	116	19,8	139	24,3	143	22,7	148	21,7
3500-3999	242	38,1	241	41,1	190	33,2	225	35,8	270	39,5
4000-4499	132	20,8	131	22,4	144	25,1	141	22,4	161	23,6
4500-4999	42	6,6	37	6,3	23	4,0	38	6,0	40	5,9
> 5 kg	5	0,8	5	0,9	5	0,9	3	0,5	1	0,1
Tils. omanfyri 2500 g	**609**	**95,9**	**571**	**97,4**	**545**	**95,1**	**600**	**95,4**	**662**	**96,9**
Ikki upplýst	10	1,6	7	1,2	10	1,7	8	1,3	4	0,6
Tilsamans	**635**	**100**	**586**	**100**	**573**	**100**	**629**	**100**	**683**	**100**

3.22 Børn, skift á øki (roknað uppí eru børn, sum eru fødd í Føroyum, men mamman búði uttanlands)

Ár	2025		2024		2023		2022		2021	
Øki	**Tal**	**%**	**Tal**	**%**	**Tal**	**%**	**Tal**	**%**	**Tal**	**%**
Tórshavnarøkið	243	38,0	219	37,3	212	35,1	261	41,2	260	38,1
Streymoy (Havnin ikki roknað uppí)	51	8,0	49	8,3	59	10,3	45	7,1	62	9,1
Eysturoy	167	26,1	156	26,6	147	26,4	158	24,9	159	23,3
Norðoyggjar	87	13,6	64	10,9	37	6,9	74	11,7	82	12,0
Vágoy	37	5,8	39	6,6	62	11,0	39	6,2	50	7,3
Sandoy	11	1,7	14	2,4	11	2,0	10	1,6	14	2,0
Suðuroy	33	5,2	39	6,6	40	7,4	42	6,6	43	6,3
Bústaður uttan fyri Føroyar	5	0,8	4	0,7	6	1,0	5	0,8	13	1,9
Ikki upplýst	6	0,9	3	0,5	0	0,0	0	0,0	0	0,0
Tilsamans	**640**	**100**	**587**	**100**	**574**	**100**	**634**	**100**	**683**	**100**

3.23 Vøggudeyði (SIDS)

Í tíðarskeiðinum 1960 – 1991 doyðu tilsamans 14 vøggudeyða (SIDS), t.e. ein deyðatilburður annaðhvørt ár í miðal. Seinastu 35 árini hava bert verið tríggir deyðatilburðir tilsamans av hesum slagi, tann seinasti í 2012.

4. Fosturtøkur (abortus provocatus)

1. juli 2026 kom ein nýggj fosturtøkulóggáva í gildi. Kvinnur kunnu nú fáa fosturtøku, um inntrivið verður gjørt áðrenn endan av 12. viku í viðgongutíðini. Fosturtøka kann bert verða gjørd á sjúkrahúsum.

4.1 Tal á fosturtøkum í Føroyum, eftir aldri á kvinnunum

Sambært tølum frá Hagstovu Føroya vórðu 33 fosturtøkur framdar í 2025.

Tølini fyri fosturtøkur býttar eftir aldri hjá kvinnunum hava seinnu árini verið:

Ár/Aldur	<15	15-19	20-24	25-29	30-34	35-39	40-44	45-49	Tal á fosturtøkum tilsamans
2025	0	3	5	3	12	5	4	1	33
2024	1	3	10	7	10	5	7	0	43
2023	0	5	6	10	13	7	1	0	42
2022	0	2	8	6	4	5	2	0	27
2021	0	6	6	6	7	3	4	2	34
2020	0	3	12	4	3	4	3	0	29
2019	0	2	2	11	4	2	0	0	21
2018	0	3	8	4	4	3	3	0	25
2017	0	2	4	7	2	2	2	0	19
2016	0	3	6	7	3	6	0	1	26

Kelda: Hagstova Føroya

5. Stervingar (sterilisatiónir)

1. januar 2026 kom løgtingslóg nr. 198 frá 9. desember 2025 um sterilisatión og kastratión (Sterilisatiónslógin) í gildi. Persónar, sum eru fyltir 25 ár, og sum eru førir fyri at skilja týdningin av inntrivinum, hava nú rætt til at verða steriliseraðir.

5.1 Fundir í Stervingarnevndini (Sterilisatiónsnevndini)

Í 2025 gekk Stervingarnevndin umsóknum á møti frá 109 fólkum. Fimm umsóknir vórðu lagdar til viks, tí upplýsingar vantaðu/avvístar.

5.2 Tølini fyri játtaðar umsóknir

Tølini seinastu árini hava verið hesi:

Ár	Menn	Kvinnur	Tilsamans
2025	94	14	109
2024	82	17	99
2023	81	31	112
2022	63	17	80
2021	41	23	64
2020	57	23	80
2019	43	31	74
2018	36	23	59
2017	38	23	61
2016	35	24	59

Kelda: Henrik Møller, sorinskrivari

6. Deyðleiki

6.1 Tal á føroyingum, deyðir í 2025

Sambært deyðaváttanunum doyðu 419 føroyingar í 2025 (219 menn og 200 kvinnur).

6.2 Pinkubarnadeyði

Sambært uppgerðini hjá Landslæknaembætinum doyðu fimm børn undir eitt ár í 2025.

Pinkubarnadeyðin í Føroyum í 2025 (deyð, undir eitt ár pr. 1000 livandifødd) var sostatt 7,9.

6.3 Deyðfødd

Fimm børn vóru deyðfødd í 2025.

6.4 Miðal væntað lívsævi frá lívsbyrjan og frá 65 ára aldri

Miðal væntað lívsævi frá lívsbyrjan:



LOWESS-javngjørd tøl. Kelda: Hagstova Føroya

Miðal væntað lívsævi frá 65 ára aldri:



LOWESS-javngjørd tøl. Kelda: Hagstova Føroya

6.5 Væntaður livialdur hjá nýføðingum í Føroyum

Ár	Bæði kyn	Menn	Kvinnur
2024/25	83,0	81,9	84,1
2023/24	82,7	81,5	83,8
2022/23	82,3	79,7	85,2
2021/22	81,7	80,3	83,2
2020/21	83,7	82,3	85,3
2019/20	83,0	80,6	85,5
2018/19	82,7	80,4	85,3
2017/18	82,2	79,9	84,7
2016/17	82,2	80,8	83,7
2015/16	82,5	80,7	84,5

Ikki javngjørd tøl. Kelda: Hagstova Føroya

6.6 Deyðastað

Í 2025 vóru 51,6% av øllum andlátum á sjúkrahúsi, 33,2% á ellis- og røktarheimi/sambýli/stovni og 11,7% í egnum heimi. Deyðastaði var ikki upplýst hjá 3,3% av andlátunum, og hjá 0,2% var deyðastaði skrásett sum "annað".

Myndin niðanfyri vísir býtið millum, hvar fólk doyðu frá 2016 – 2025.



6.7 Deyðaatvold hjá føroyingum

Á næstu bls. eru at finna talvur yvir deyðaatvold í Føroyum fyri menn og kvinnur við støði í deyðaváttanum viðvíkjandi árunum 2016 til 2025. Føroyingar við føstum bústaði í Føroyum, men deyðir uttanlands, eru tiknir við, men fólk deyð í Føroyum við føstum bústaði í øðrum londum eru ikki við í hesum hagtølum.

Deyðaatvold hjá monnum í tíðarbilinum 2016 – 2025											
Kota	**Flokking**	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**	**2020**	**2021**	**2022**	**2023**	**2024**	**2025**
A01	Ígerðarsjúkur íroknað snúltandi sjúkur (parasittar)	4	4	2	6	-	13	25	6	6	8
A02	Krabbamein	47	68	63	60	60	53	74	63	60	57
A03	Aðrir svullir (onnur neoplasi)	2	1	2	1	3	1	3	2	1	3
A04	Sjúka í blóði og blóðskapandi gøgnum, sum ávirkar immunskipanina	-	1	-	-	1	1	-	-	-	1
A05	Endokrinar og føðslutreytaðar sjúkur og stoffskiftissjúkur	12	4	4	4	5	7	10	9	9	8
A06	Sálarligar líðingar og atferðarligt órógv	9	15	12	17	10	16	9	7	13	13
A07	Sjúka í nervalagnum og sansum	10	12	8	15	10	18	15	6	13	4
A08	Hjartasjúkur	39	43	42	41	23	40	30	45	40	34
A09	Aðrar blóðrenslusjúkur	15	22	12	12	16	16	25	19	16	22
A10	Aðrar sjúkur í andagøgnum	21	17	25	22	18	25	25	16	23	22
A11	Sjúkur í sodningargøgnum	9	5	12	8	10	3	7	8	5	7
A12	Sjúka í húð og undirhúð	-	-	-	-	-	-	-	-	-	1
A13	Sjúka í knoglum, musklum og bindivevnaði	1	2	1	1	-	1	1	1	-	1
A14	Sjúka í vatnræsi og kynsgøgnum	1	7	5	8	3	3	2	6	10	6
A15	Tvørleikar í viðgongu og føðing	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-
A16	Ávísar sjúkur í smb.v. føðitíðarskeið (perinatalperioden)	-	-	-	-	1	-	-	1	-	2
A17	Viðføtt vanskapni og kromosombrek	2	2	1	-	1	1	3	2	1	2
A18	Symptomir og óvanligt fund, vánaliga greinaðar orsøkir	8	9	3	11	5	2	6	6	12	10
A19	Vanlukkur	12	9	10	8	9	6	15	4	12	15
A20	Sjálvmorð og sjálvmorðsroynd	-	2	3	1	4	2	3	1	1	2
A21	Dráp og álop	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-
A22	Tilburðir við óvissum umstøðum	-	-	-	1	-	1	-	-	-	-
A23x	COVID-19 - Korona	-	-	-	-	-	1	2	1	-	-
A24	Andlát uttan læknafrøðiligar upplýsingar	-	3	7	-	10	9	5	1	-	1
	Tilsamans	**192**	**226**	**212**	**216**	**189**	**219**	**260**	**204**	**222**	**219**

Keldur: Sundhedsstyrelsen og Hagstova Føroya

Deyðaatvold hjá kvinnum í tíðarbilinum 2016 – 2025											
Kota	Flokking	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022	2023	2024	2025
A01	Ígerðarsjúkur íroknað snúltandi sjúkur (parasittar)	1	-	3	2	5	11	11	9	8	7
A02	Krabbamein	55	54	40	42	32	49	64	58	71	44
A03	Aðrir svullir (onnur neoplasi)	-	4	-	-	-	3	3	4	-	3
A04	Sjúka í blóði og blóðskapandi gøgnum, sum ávirkar immunskipanina	1	1	-	1	1	-	3	1	-	1
A05	Endokrinar og føðslutreytaðar sjúkur og stoffskiftissjúkur	4	4	5	6	1	4	4	3	9	7
A06	Sálarligar líðingar og atferðarligt órógv	15	22	20	15	7	20	13	21	20	13
A07	Sjúka í nervalagnum og sansum	12	12	7	10	14	9	13	9	19	9
A08	Hjartasjúkur	21	24	31	19	19	32	23	14	26	22
A09	Aðrar blóðrenslusjúkur	22	22	13	19	17	18	19	15	15	17
A10	Aðrar sjúkur í andagøgnum	16	27	24	22	25	28	31	26	21	37
A11	Sjúkur í sodningargøgnum	4	4	5	11	10	3	7	4	5	7
A12	Sjúka í húð og undirhúð	-	-	1	-	-	-	-	-	-	1
A13	Sjúka í knoglum, musklum og bindivevnaði	3	2	-	2	-	3	2	1	2	2
A14	Sjúka í vatnræsi og kynsgøgnum	3	8	3	12	5	4	4	10	11	4
A15	Tvørleikar í viðgongu og føðing	-	-	-	-	-	-	-	-	-	
A16	Ávísar sjúkur í smb.v. føðitíðarskeið (perinatalperioden)	-	1	-	1	-	1	-	-	-	1
A17	Viðføtt vanskapni og kromosombrek	-	2	-	-	-	-	-	1	1	1
A18	Symptomir og óvanligt fund, vánaliga greinaðar orsøkir	9	25	12	16	14	10	10	14	7	17
A19	Vanlukkur	8	1	8	7	5	5	7	11	6	7
A20	Sjálvmorð og sjálvmorðsroynd	2	-	-	-	-	-	-	1	1	-
A21	Dráp og álop	-	-	-	-	-	-	-	-	-	
A22	Tilburðir við óvissum umstøðum	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-
A23x	COVID-19 - Korona	-	-	-	-	-	2	2	-	-	-
A24	Andlát uttan læknafrøðiligar upplýsingar	1	2	1	-	19	3	3	1	-	-
	Tilsamans	**177**	**215**	**173**	**185**	**174**	**205**	**219**	**203**	**222**	**200**

Keldur: Sundhedsstyrelsen og Hagstova Føroya

7. Rættarlæknaligt virksemi

7.1 Rættarlæknaligar líkskoðanir

Í 2025 vóru tilsamans 25 rættarlæknaligar líkskoðanir. Í ávísum førum, verða rættarlæknaligar líkskoðanir, eftir samráð millum løgreglu og landslækna, ikki framdar. Tað er t.d. tá ein deyðfunnin persónur hevur eina sjúkrasøgu og tað er eyðsýnt, hvat viðkomandi er deyður av, ella ein persónur doyr eina tíð eftir eina vanlukku. Í 2025 vóru 13 slík mál.

7.2 Rættarlæknaligir líkskurðir

Í 2025 vóru framdir sjey rættarlæknaligir líkskurðir.

7.3 Líkpass

Í 2025 varð einki líkpass skrivað.

7.4 Náttúrligur deyði

Í 15 av 25 førum var deyðsháttur eftir rættarlæknaliga líkskoðan (í summum førum við líkskurði aftaná) skráettur sum náttúrligur deyði í 2025.

7.5 Vanlukkutilburðir

Talvan niðanfyri sýnir tann partin av rættarlæknaligu líkskoðanunum, har ið orsøkin til deyðatilburðin er vanlukka. Tølini síðani 2016 eru hesi:

Ár	Deyðatilburðir elvdir av vanlukku
2025	8
2024	11
2023	3
2022	10
2021	7
2020	7
2019	6
2018	7
2017	10
2016	8
Tils. 2016 - 2025	**77**

7.6 Sjálvmorð

Sjálvmorð hjá fólki við føstum bústaði í Føroyum, býtt í 5-ára tíðarbil frá 1996 til 2025:

Ár	Talið á sjálvmorðum
2025-2021	11
2020-2016	10
2015-2011	11
2010-2006	11
2005-2001	14
2000-1996	9

Samanborið við hini Norðurlondini liggur talið á sjálvmorðum lágt í Føroyum.

Víst verður til frágreiðingina **Prevention of suicide and suicide attempts in the Nordic countries** frá Nordic Council of Ministers 2024, https://pub.norden.org/temanord2024-509/.

8. Virksemi viðvíkjandi umhvørvi

8.1 Kirkjugarðar

Trý mál um kirkjugarðar vóru viðgjørd hjá Landslæknanum í 2025.

8.2 Mál um at umhvørvisgóðkenna virki

Í 2025 var einki mál um at umhvørvisgóðkenna virki.

9. Eftirlit við heilsuverkinum

9.1 Heilsufaklig eftirlit

Landslæknin hevur eftirlit við øllum løggildum heilsustarvsfókið og viðgerðarstøðum í bæði tí almenna og privata heilsuverkinum. Við stakroyndum verða tey ymsu viðgerðarstøðini vald burturúr til eftirlit. Hetta eru sonevnd planløgd eftirlit.

Eftirlit kunnu eisini verða framd, um Landslæknin fær eitt stúranarskriv frá td. sjúklingum, avvarðandi ella starvsfólki á stovnum, umframt upplýsingar frá øðrum myndugleikum ella í sambandi við líksýn. Landslæknin kann eisini verða kunnaður um ymisk viðurskifti gjøgnum sjúklingafeløg ella miðlar. Tað skal verða talan um eina ítøkiliga stúran um sjúklingatrygdina á tí ávísa viðgerðarstaðnum. Hetta eru sonevnd reaktiv eftirlit.

Fyri øll sløg av viðgerðarstøðum eru tað ávís punkt, ið verða kannað undir einum eftirliti. Hetta eru sonevnd mátipunkt.

Eftir hvørt eftirlit verður ein eftirlitsfrágreiðing gjørd. Har ber til at síggja, um tað er eitthvørt, sum ikki er í lagi, sum hevur týdning fyri sjúklingatrygdina.

Í juli í 2022 varð "Bekendtgørelse nr. 922 af 16. juni 2022 for Færøerne om registrering af, underretning om og tilsyn med offentlige og private behandlingssteder m.v." sett í gildi í Føroyum. Kunngerðin áleggur øllum viðgerðarstøðum at skráseta seg í einari skrá yvir viðgerðarstøð og skal Landslæknin hava eftirlit við 8-10% av viðgerðarstøðunum hvørt ár. Í 2025 hevði Landslæknin eftirlit við 8% av viðgerðarstøðunum. Byrjað var uppá eftirlitini í november 2022.

Í eftirlitsmálum við stovnum (organisationstilsynssager) er tað leiðslan á staðnum, sum verður biðin um upplýsingar og úttalilsi. Tað er leiðslan á viðgerðarstaðnum, sum hevur ábyrgd av, at arbeiðið verður gjørt á ein hátt, sum er ráðiligur fyri sjúklingatrygdina. Leiðslan skal tryggja fyriskipanarligar karmar, leiðbeining, upplæring og eftirlit, og leypandi fylgja sjúklingatrygdini. Tá vandi er fyri sjúklingatrygdini, kann úrskúrður í eftirlitsmálum við stovnum verða gjørdur eftir §215b í Sundhedsloven. Landslæknin hevur heimild at krevja upplýsingar, ið eru neyðugir fyri eftirlitið.

Í eftirlitsmálum við stovnum eru tað ikki tey einstøku heilsustarvsfólkini, ið Landslæknin metur um, men um sjálvan stovnin. Í heilt serligum førum kann eitt persónsmál, ið snýr seg um eitt ávist heilsustarvsfólk koma burturúr. Hetta kann henda í samband við eitt eftirlitsmál á einum stovni, um illgruni stingur seg upp, um at eitt - ella fleiri heilsustarvsfólk eru til vanda fyri sjúklingatrygdina. Eitt slíkt mál verður viðgjørt sum ein sjálvstøðugt mál.

9.1.1 Skráseting

Til tess at tryggja, at vit eru kunnig við øll viðgerðarstøð, skulu øll almenn og privat viðgerðarstøð skrásetast. Ávís viðgerðarstøð skulu skráseta ein ábyrgdarhavandi lækna/tannlækna. Eisini skulu heilsustarvsfólk á privatum viðgerðarstøðum skrásetast og góðkennast til at kunna veita kosmetiska viðgerð. Møguligt hjálparfók á kosmetiskum viðgerðarstøðum skal eisini skrásetast.

Landslæknin hevur gjørt eina skrá yvir hesi viðgerðarstøð. Skráin yvir viðgerðarstøð er at finna á heimasíðu Landslæknans. Eisini er ein serstøk skrá yvir kosmetisk viðgerðarstøð gjørd við upplýsingum um viðgerðarar og hvørjar viðgerðir loyvt er at gera.

9.1.2 Gjald

Í november 2026 vóru uml. 250 viðgerðarstøð skrásett. Sambært kunngerðini skulu øll viðgerðarstøð gjalda eitt ómaksgjald, sum skal rinda fyri útreiðslurnar hjá Lanslæknanum í samband við eftirlitini. Í 2025 vóru kr. 814.388 innheintaðar í gjøldum frá viðgerðarstøðunum, og samlaðu útreiðslurnar fyri eftirlit, ráðgeving og løgfrøðiliga hjálp, vóru kr. 1.269.135. Landslæknin rindar undirskotið.

9.1.3 Eftirlitsfrágreiðingar

Eftirlitsfrágreiðingar eru tøkar á heimasíðuni hjá Landslæknanum. Eftirlitfrágreiðingar eru almennar í 3 ár. Eftir 3 ár verða tær strikaðar. Frágreiðingar frá sama viðgerðarstaði ella røktareind koma í staðin fyri hvørja aðra, og tí kann ein bert síggja ta nýggjastu útgávuna. Talið á frágreiðingum er sostatt ikki eitt tekin um, hvussu nógv eftirlit eru framd, og kann tí ikki brúkast til hagfrøðilig endamál.

Í 2022 vórðu bert fýra eftirlit gjørd, tí byrjað varð ikki fyrr enn í november. Í 2023 vórðu 19 eftirlit gjørd, sum fevndu yvir eina kommunulæknaviðtalu (administrativt eftirlit), eitt sjúkrahús (administrativt eftirlit), sjey røktarheim, seks avrúsingar- og bútilboð og fýra eftirlit á kosmetiskum klinikkum. Í 2024 vórðu 22 eftirlit gjørd, sum fevndu yvir 14 kommunulæknaviðtalur og átta røktarheim. Í 2025 vórðu 21 eftirlit gjørd, sum fevndu yvir tríggjar kommunulæknaviðtalur, tíggju tannlæknaviðtalur, seks røktarheim (av teimum vórðu tvey administrativ eftirlit) og tvey eftirlit á herberginum.

Í 2026 er ætlanin at hava eftirlit við bústovnum og optikarum. Ætlanin er at hava 20 eftirlit í 2026.

9.2 Eftirlit við einstaklingum

Í 2025 vóru 14 mál viðvíkjandi fakligum eftirliti við heilsustarvsfólki og fýra mál viðvíkjandi førleika hjá heilsustarvsfólki (misnýtsla og sjúka).

9.3 Eftirlit við viðgerðarfyriskipanum

Í 2025 var eitt mál viðvíkjandi eftirliti við viðgerðarfyriskipanum (ordinationstilsyn).

9.4 Mál viðvíkjandi løggildum heilsustarvsfólki við 75 ára aldur

Landslæknin viðgjørdi í 2025 tvey mál viðvíkjandi rættinum hjá løggildum heilsustarvsfólki til sjálvstøðugt virki við 75 ára aldur.

9.5 Kærur um løggild heilsustarvsfólk

Í 2025 vórðu 43 nýggj kærumál viðvíkjandi fakliga virkseminum hjá løggildum heilsustarvsfólki. Kærumálini vórðu send til viðgerð hjá Styrelsen for Patientklager í Danmark, sum tekur endaliga støðu í málunum.

Talið á kærumálum og eitt yvirlit yvir úrslitini av kærumálunum seinastu árini er víst í talvuni niðanfyri.

Ár	2025	2024	2023	2022	2021	Tils. frá 2021 - 2025
Kærumál sum eru send til STPK	**43**	**38**	**24**	**28**	**26**	**159**
Kærumál í viðgerð	4	0	0	0	0	4
Kærumál, sum bíða eftir avgerð	14	3	0	0	0	17
Afturlatin/avvíst kærumál	10	6	4	11	10	41
Kærumál við avgerð	**15**	**29**	**20**	**17**	**16**	**97**
Kærumál uttan kritikk	13	23	15	13	14	78
Kærumál við kritikki	2	6	5	4	2	19
% kritikk	**13%**	**21%**	**25%**	**24%**	**13%**	**20%**
Kritikk fyri viðgerð	*1*	*5*	*5*	*2*	*0*	*13*
Kritikk fyri skjalføring	*0*	*0*	*0*	*1*	*0*	*1*
Kritikk fyri viðgerð og skjalføring	*0*	*1*	*0*	*1*	*1*	*3*
Kritikk fyri skjalainnlit	*1*	*0*	*0*	*0*	*1*	*2*

9.6 Stúranarskriv

Um ein er stúrin um viðurskiftini á einum viðgerðarstaði ella hjá einum løggildum heilsustarvsfólki, kann ein fráboðan sendast til Landslæknan. Slíkar fráboðanir kunnu snúgva seg um sjúku ella misnýtslu hjá einum heilsustarvsfólki ella um brot á fakligar reglur og normar. Tað kann eisini vera, at ein er stúrin um sjúklingatrygdina á einum viðgerðarstaði.

Landslæknin kannar, um illgrunin er grundaður ella ikki, og setur neyðugu tiltøkini í verk.

Í 2025 viðgjørdi Landslæknin 23 stúranarskriv.

10. Apoteksverkið

10.1 Apotek, handkeypssølur og starvsfólk í 2025

	Tal og ársverk
Apotek	6
Apoteksdeildir	-
Handkeypssølur	19
Farmaceutar	26,7
Farmakonomar	56,0
Onnur starvsfólk	38,6
Næmingar	24,0
Tilsamans	145,3

Keldur: Landsapotekarin og Hagstova Føroya

10.2 Skrásetingarnevndin

Í skrásetingarnevndini viðvíkjandi heilivágstilbúnaði eru Landsapotekarin, Landsdjóralæknin og Landslæknin. Í 2026 varð skrásetingarnevndin avloyst av Heilivágsráðnum (Kunngerð nr. 159 frá 21. oktober 2025 um Heilivágsráðið).

10.3 Útflýggingarloyvi

Í 2025 gav landslæknin í 73 førum læknum loyvi at flýggja út heilivág, ið ikki var skrásettur, frá apotekunum.

Hetta virksemið umsitur Lægemiddelstyrelsen í Danmark, men av tí at føroyska heimastýrið hevur yvirtikið apoteksverkið, er danska heilivágslógin ikki galdandi í Føroyum.

11. Annað virksemi

11.1 Mál viðvíkjandi koyrikorti

Landslæknin er læknafakligi mynduleikin, tá talan er um heilsustøðu viðvíkjandi koyrikorti.

Akstovan biður í hesum sambandi um tilmæli og útsøgn frá Landslæknanum, tá læknin hjá umsøkjara hevur viðmerkt onkra sjúku ella støðu, sum skal metast um, áðrenn umsøkjari kann fáa koyrikort útskrivað ella endurnýggjað.

Í 2025 gjørdi Landslæknin tilmæli í 841 málum viðvíkjandi koyrikortum.

11.2 Metingar av heilsustøðu

Landslæknin virkar sum ráðgevi hjá føroyskum myndugleikum, tá ið um ræður at meta heilsustøðuna í tænastumannamálum. Í 2025 vórðu sjey mál viðgjørd.

11.3 Gitnaðarmál

Eink mál viðvíkjandi gitnaði varð viðgjørt í 2025.

11.4 Verjumál

Í 2025 viðgjørdi Landslæknin seks mál.

11.5 Upplýsingar úr sjúkrajournalum til gransking, hagtøl ella ráðlegging

Tá ein granskari hevur tørv á upplýsingum úr sjúkrajournalum til ítøkiliga gransking, skal loyvi fáast frá Landslæknanum at geva víðari og innheinta sjúkrajournalupplýsingar til gransking, hagtøl og ráðlegging sambært Sundhedsloven § 46, stk. 2 ella § 47, stk. 1.

Í 2025 viðgjørdi Landslæknin 12 slík mál.

11.6 Gransking

Landslæknin fær javnan fyrispurningar um ymisk hagtøl í sambandi við gransking. Í 2025 vóru 10 slík mál.

11.7 Skjalainnlit

Landslæknin fekk í 2025 fimm umbønir um skjalainnlit.

12. Fólkaheilsa

Landslæknaembætið hevur í mong ár – fyrstu ferð í 1980 – lagt dent á týdningin av øktum og samskipaðum virksemi viðvíkjandi heilsuupplýsing, og í 1999 varð eitt lógaruppskot samtykt í løgtinginum um at seta á stovn fyribyrgingarráð.

Í 2008 varð heitið við lóg broytt til Fólkaheilsuráðið.

Eisini verður víst til heilsulýsingar Landslæknans fyri Føroyar viðvíkjandi árunum 1999 (bls. 32 og 37) og 2000 (bls. 31).

Í 2023 varð Heilsustýrið stovnað, og virksemi hjá Fólkaheilsuráðnum varð lagt undir nýggja stýrið.

Heilsustýrið (fyrrv. Fólkaheilsustýrið) gjørdi á heysti 2023 eina stóra fólkaheilsukanning: "Hvussu hevur tú tað". 8000 fólk millum 18-85 ár fingu innbjóðing um at luttaka í kanningini. 5104 (64%) svaraðu spurnarkanningini. Fólkaheilsukanningin "Hvussu hevur tú tað?" varð eisini gjørd í 2019 og 2015.

Øll úrslitini frá kanningini kunnu lesast í frágreiðingini "Hvussu hevur tú tað? Heilsan hjá føroyingum – 2023", sum kom út í apríl 2025.

12.1 Koppseting

Í juli 2026 gav Heilsustýrið út frágreiðingina "Barnakoppsetingarhagtøl í Føroyum 2012-2025". Frágreiðingin vísir, at undirtøkan fyri teimum fyrstu koppsetingunum er góð, men minkar støðugt fyri hvørja koppseting, sum barnið eigur at fáa frá 15 mánaða aldri.

Frágreiðingin vísir eisini, at børn ofta ikki verða koppsett rættstundis.

Størsta avbjóðingin sæst í HPV-koppsetingini, har parturin av bæði gentum og dreingjum, sum eru liðugt koppsett, er langt undir 90%, sum er málið hjá WHO.

12.1.1 Áminningarskipan

Í september 2026 setti Heilsustýrið í verk eina áminningarskipan, sum sjálvvirkandi sendir foreldrum eina áminning, tá barn teirra eigur at fáa eina tilmælda koppseting. Heilsustýrið væntar, at skipanin fer at økja um talið á børnum, ið fáa barnakoppsetingar, og eisini at økja um talið á børnum, sum fáa koppsetingarnar rættstundis.

Meira kann lesast um áminningarskipanina á heimasíðuni hjá Heilsustýrinum.

12.2 Cerebral paresa

Í september 2026 gav Heilsustýrið út frágreiðingina "Cerebral paresa í Føroyum 2009-2023".

Cerebral paresa (CP) er eitt varandi brek, sum stavar frá einum skaða í heilanum, sum kann koma í móðurlívi, undir føðing ella hjá nýfødda barninum.

Endamálið við frágreiðingini var at lýsa støðuna hjá børnum við CP í Føroyum og at skapa eitt betri grundarlag fyri skráseting, uppfylging og fyribyrging.

12.3 Rúsdrekkasøla

Rúsdrekkasølan, 100% alkohol litrar til hv. fólk yvir 15 ár og øll frá 2016 til 2025 (tollfrí søla ikki íroknað):



Kelda: Hagstova Føroya


LANDSLÆKNIN
STYRELSEN FOR PATIENTSIKKERHED